Vikuskiftis Sosialurin



Til minnis um okkara elskaðu vinkonu

# Unn Hansdóttir

**fødd 15. juli 1988 deyð 20. apríl 2007**



Góða, elskaða Unn.

Ongantíð hevur sorgin verið størri enn tann dagin, vit mistu teg. Dagurin hjá okkum byrjaði sum vanligt, men tín var longu liðugur.

Tú hevði alt lívið framman fyri tær, og visti hvat tú skuldi brúka tað til. Tú gekk í handilsskúla og hevði eitt ár eftir. Eisini ætlaði tú í bíbliuskúla í Onglandi, síðani út í verðina sum trúboðari. Tú elskaði familjuna hjá tær og setti tey altíð í fremstu røð.

Tú dugdi væl í skúlanum og arbeiddi hart. Eisini dugdi tú væl at lurta og geva ráð, og tú stóð fast við tað, sum tú trúði uppá.

Tú var nakað fyri teg, tú hugsaði øðrvísi enn aðrar 18 ára gamlar gentur. Til dømis hugsaði tú um hvat var tað enska orðið fyri »Vestara áarbakka« og hví «at kunna« ikki hevði nakran navnhátt á enskum. Tú las bøkur so sum »Á skatturin, skatturin« og »Dávur í Tjørnuvík«.

Tú var sera opin og segði alt akkurát sum tað var, so var tað nakað, man vildi vita, og vildi man hava eitt erligt svar, so var bara at spyrja teg. Tú var altíð glað, hjartagóð og klár at geva eina hjálplandi hond. So skjótt tú kom inn til eina av okkara, føldi tú teg heima og fór at gera kaffi.

Tú fekk altíð fólk at flenna. Og var tað ikki við teimum stuttligu tingunum, tú segði, so var tað við teimum stuttligu grimassunum, tú gjørdi. Tú var ein sera góð vinkona og tað besta menniskja.

Vit sita allar enn og bíða eftir, at tú skal ringja ella koma inn at práta eina løtu. Vit hava øll tey góðu minnini um teg í okkara hjørtum, og tað fyllir okkum við gleði og kærleika, sum eisini hjálpa okkum gjøgnum hesa ringu tíð. Og tá vit hugsa um teg, og tíðina vit hava havt saman, er tað lættari hjá okkum at kunna práta, gráta og flenna saman.

Tað gongur ikki ein tími, har vit ikki hugsa um teg og tíni, ið eftir sita. Lívið er ikki tað sama uttan teg og tað fer tað ongantíð at verða aftur. Okkum leingist ótrúliga nógv eftir tær, og fara vit aldri at gloyma teg.

Takk fyri alt. Sov gott, elskaði eingil, til vit síggjast aftur. Vit elska teg.

Heilsan
Turið, Nora Maria, Vár, Sissal og Hanna

**I'm sorry for all the words**

*I'm sorry for all the words I didn't say*
*It's too late – cause now you've gone so far away*
*I feel like I'm lost – with nothing left but*
*shattered dreams*
*So lonely – I'm holding on to memories*

*But then I feel your love surrounding me*
*And it takes away the pain inside of me*
*I believe we'll be together.*

*We may be so far apart.*
*But I know that you'll always stay inside*
*my heart*
*Your spirit gives me hope to carry on*
*I understand that even though you're gone.*
*Life goes on, life goes on without you.*

*Another day – Another time and place*
*Somewhere, someway – we'll meet another day.*
*No matter how much we need you now*
*Heaven needed you more.*

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Føðingar



*Í januar fekk Benjamin Vijay lítlusystur sína, sum er fødd 21. november 2005 í India (Mombai) og eitur Jóhanna Maria Geetali. Foreldur teirra eru Haldís Ólavsdóttir og Óli Lisberg og tey búgva í Hoyvík.*



*1. juli fingu Gunnvá Bjarkhamar og Hjalti Thomsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon vigaði 3750gr og var 53 cm long.*



*Tann 3. juli bleiv Heiðrun stórasystur. Tá Malan Holm Erlingsson & Niels Gunnar Petersen, Tórshavn, fingu eina gentu, sum var 53 cm og vigaði 3450 gram.*

25. juni fingu Maj-Britt og Erling Jacobsen, Gøtugjógv, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3975 gr.

6. juli fingu Erla Heinesen Højsted og Osvald Olsen, Frederiksberg, ein son, hann var 53 cm langur og vigaði 3300 gr.

7. juli fingu Poula Bech, Tórshavn, og Hansmar Poulsen, Toftum, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2950 gr.

7. juli fingu Durita Patti og Pauli Dahl, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3350 gr.

7. juli fingu Marjun Jakobsen og Sigmar Davidsen, Argjum, ein son. Hann var 60 cm langur og vigaði 5250 gr.

8. juli fingu Akiko og Ragnar Waagstein, Kagawa Japan, eina dóttur. Hon vigaði 2590 gr. og var 45,6 cm long.

10. juli fingu Sunniva Østerø og Jan Ljósá, Strondum, tvíburar. Onnur var 51 cm long og vigaði 2890 gr, hin 51 cm long og vigaði 2780 gr.

11. juli fingu Málfríð og Jacob Pauli Lamhauge, Strondum, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4000 gr.